Klaksvíkar Kommuna I Tekniska Umsiting




# SØLA AV GRUNDØKI Í MIÐBÝARØKINUM Í KLAKSVÍK

**Sambært kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av fastari ogn lýsir Klaksvíkar Kommuna eitt grundøki í miðbýar-økinum til sølu.**

Talan er um eitt grundøki uppá uml. 750 m² liggjandi í øki D5.1. við økisásetingini:

- *Økið verður tilskilað almennum stovnum, samkomuhøli, bókasavni, frítíðarvirksemi, handilsbygningum, grønum økjum, hotelli, býarhúsi, smábátahavn v.m. samb. heildar ætlan, sum gjørd er fyri miðstaðarøki.*
- *Byggingar- og nettonýtingarstigið verður viðgjørt fyri hvørt byggimál sær, og skal byggingin innan D5-økið lagast eftir teim ætlanum, sum vístar og nevndar eru í hefti, ið er yvir miðbýin.*

Økið er enn ikki matrikulerað, men áheitan um matrikulering er latin Umhvørvisstovuni til góðkenningar. Søla av ognini er treytað av, at umsøkta matrikulering verður góðkend.

Á ognini stendur ein hitamiðstøð (uml. 25 m²), og skal møguligur keypari tola, at hendan verður standandi. Møguleikin fyri tilknýti í hitamiðstøðina er ein samráðingarspurningur partanna millum. Alt eftir hvat virksemið í bygninginum verður, kunnu samráðingar takast upp um møguliga samanbinding í inngongdina til læknamiðstøðina.

Ognin verður lýst til sølu fyri minst kr. 1500,- m² til endamáls svarandi til ásetingar byggisamtyktarinnar. – Saman við tilboðnum skal verða latin frágreiðing um, hvørjar ætlanir eru við bygging á ognini og skitsa av ætlaðari útsjónd. Byggingin skal hava tvær gagnnýttar hæddir.

Nýbygging í miðbýarøkinum skal halda ein yvirskipaðan arkitektoniskan stíl, og kann tí roknast við, at útsjóndarlig krøv verða sett til byggingina á útbjóðaða økinum.

Upplýsingar um ognina kunnu fáast á Teknisku Umsiting telefon 410000.

Við heimild í § 6 í somu kunngerð stendur tað kommununi frítt at velja millum innkomin tilboð ella onki at taka.

Møgulig tilboð skulu vera skrivlig og skulu vera Klaksvíkar Kommunu í hendi í afturlatnum brævbjálva - viðm. "við Sandin" í seinasta lagi:

**19. januar 2010 á middegi.**

Innkomin tilboð verða viðgjørd í trúnaði, inntil ognin er seld.

*Klaksvík 14. desember 2009*

**Klaksvíkar Kommuna**
**Postboks 2**
**710 Klaksvík**

Klaksvíkar Kommuna I Nólsoyar Pálsgøta 32 I FO-700 Klaksvík I Tel. 410000 I Fax. 410001 I klaksvik@klaksvik.fo I klaksvik.fo


